# Collagen-gelatin-verkætlanin



**HÓRALDUR JOENSEN**
Granskingarleiðari á Granskingarkjarnanum í evnafrøði og lívtøkni
Lektari á Fróðskaparseturi Føroya

Tætt samarbeiði millum Granskingarkjarnan í evnafrøði og lívtøkni og Faroe Marine Biotech í fyrstu atløgu og Faroe Marine Biotech og Junca í aðru atløgu hava ført til stovnsetan av Seanenergy. Nógvar vinnuligar granskingarverkætlanir kundu verið settar í verk um Føroyar settu pening av til gransking eins og onnur lond kring okkum. Men vit føroyingar tykjast ikki hava álit á vísindum. Fleiri leiðandi og umboðandi persónar hava í fjølmiðlunum sett fram niðrandi útsagnir um granskarar landsins. Og mansdomineraða politiska heimastýrið hevur í longri tíð vanstýrt landsins gransking, menning, vinnulívi við syrgiliga lágum játtanum og vána fyriskipanum.

**Collagen kapslar til lýsi og heiligvág**
***Granskingarkjarnur***
Framkomnar búskaparfrøðiligar greiningar hava aftur og aftur víst eitt greitt positivt samband millum gransking og fíggjarliga framgongd. Henda veruleika tók Fiskimálaráðið til eftirtektar og stovnsetti fyri skjótt fimm árum síðani tríggjar granskingarkjarnur. Eina í evnafrøði og biotøkni, eina aðra í framleiðslutøkni og eina triðju í veiðutøkni. Stutt eftir stovnsetingina vórðu hesar kastreraðar fíggjarliga av landsins leiðslu. Fæið, sum varð ætlað at seta vinnulívsrættaðar verkætlanir í gongd við, varð minkað til eitt minimum.

**Vinnulívsrelateraðar verkætlanir**
Hóast hesa mishugaligu byrjan, so legði Granskingarkjarnin í evnafrøði & lívtøkni saman við pørtum av vinnulívinum til brots við at fyrireika fiskivinnurelateraðar verkætlanir, umfatandi: livurverkætlan, collagen og gelatin, pepsin og peptonir frá fiska-silagu, peptidir og aminosýrur frá stimafiski og lívrunnum evnum, hydrolysat av laksahøvdum og innvølum, DHA- og EPA-oljur, marin phospholid, chitin, chitosan og glucosamin, føðsluvirði í føroyskum fiskaflaki til útflutningar, nano-hylkt funkufóðri frá marinum hjáúrdráttum, náttúrligt astaxanthin í øko-laksi, funkufóðri (functional food, heilsuvarðveitandi), nutraceutical (heilsumennandi), heiliráðskosti (medical food, heilsulekjandi), probiotics (bakteriuríkað føði) og prebiotics (trevjaríк føði), synbiotic (bakteriuríkað og trevjaríkað føði).

**Fígging**
Fyri at fáa verkætlanirnar í gongd tørvast peningur. Hesin parturin av arbeiðinum hevur verið sera tungur. Til flestu føroyskar fyritøkur eru fíggjarveikar og almennu Føroyar veita bert ein lítlan brotpart av tí til gransking, sum tær eiga at gera, skulu tær eins og onnur europeisk lond fylgja Lissabon-strategiini (3% av BTÚ til gransking og menning ár 2010). Og mótsatt ríkmonnum uttanlands, so bjóða teir føroysku ikki til at fíggja nakað her á landi, sum hevur við undirvísing, gransking og menning at gera. Útlendsk oljufeløg hava verið høvuðsálitið í mongum førum.

**PhD-undanverkætlanin**
Fitt av tíð og orku varð nýtt til at fáa fígging til ein PhD-undanverkætlan, sum millum annað hevði til endamáls at gera yvirlit yvir fyritøkur, ið framleiða gelatin og collagen, hvørjir keypararnir og marknaðirnir eru, hvørji krøv verða sett til rávøruna og hvørjir lág- og hávirðis vøruúrdráttir kunnu framleiðast úr ráevøruni.

Lýst varð eftir fólki, og ein ungur dugnaligur verkfrøðingur í biotøkni frá DTU, Jonhard Eysturskarð (JE), varð settur í starv.

**Heidelberg**
Í byrjanini av PhD-undanverkætlanin fór JE í lag við at finna, fáa til vega og lesa vísindaligar greinar, viðkomandi bóklingar og heimasíður, sum lýsa gelatin- og collagen-virksemið kring knøttin. Síðani fór JE saman við Granskingardeplinum í evnafrøði og lívtøkni og samskiparanum av fiskivinnugransking, Jákup Mørkøre á Fiskimálaráðnum, undir at fyrireika eina ferð til Heidelberg í Týsklandi, har ein stór altjóðað gelatinráðstevna varð hildin í tíðarskeiðinum 6. til 9. september 2005. Henda ráðstevna verður einans hildin fjórða hvørt ár.

Umframt at ráðstevnan gav JE eitt gott innlit í, hvat rørist á gelatin-økinum, fekst samband við granskarar, framleiðarar, sølufólk og keyparar kring allan knøttin.

**Út í heim**
Eftir hesa ráðstevnu varð farið undir at fyrireika vitjanir í Spania, Fraklandi, Onglandi, Kanada og USA.

Í Amerika vitjaði JE, Bob Welland, varastjóra hjá Kenney & Ross (Norland), sum er týdningarmesti kaldsjóarfiska-gelatin framleiðari í heiminum. Høvi fekst eisini at vitja professaran Joe M. Reigenstein, sum hevur drúgvar royndir innan gransking í fiska-gelatin og er serfrøðingur innan kosher- og halal-marknaðin. Hesir eru marknaðirnir hjá ávikavist jødum og muslimum.

**Junca**
Í Evropa vitjaði JE fyritøkuna Rousselot (Frakland), sum er næststørsti gelatin framleiðarin í heiminum, Cardinal Health (England), sum nýtir fiska-gelatin til at hylkja heilivág í, CSIC (Consejo Superior de Investigaciones Científicas, Madrid, Spania), sum hevur drúgvar royndir innan gransking í fiskagelatin, og sponsku gelatin-fyritøkuna Junca.

JE fekk samband við CSIC ígjøgnum Magnus Paula Magnussen, Cand pharm. & PhD (MPM), sum áður hevði vitjað granskingarlundina í samband við eina námsferð við næmingum úr Fiskivinnuskúlanum. MPM hevur upparbeitt eitt sera stórt og virðismikið kontaktnet av



serkønum fólkum úti í heimi, og hevur MPM og hansara netverk verið av stórum týdningi fyri føroyska gransking og menning. Í gjøgnum professaran Javier Borderías, sum starvast á CSIC, fekk JE møguleikan at vitja gelatin-fyritøkuna Junca í januar 2006. Eftir hesa vitjan og eftirfylgjandi rapportering fekk Egil Olsen, táverandi stjóri á Faroe Marine Biotech, samstarv í lag við sponsku gelatin-fyritøkuna.

**Seanenergy**
Stovnsetanin av Seanenergy á Eiði kom ikki av tilvild, men harafturímóti sum eitt beinleiðis úrslit av miðvísari og tættari samvinnu millum Granskingarkjarnan í evnafrøði og biotøkni og Faroe Marine Biotech í fyrsta umfari og millum Junca og Faroe Marine Biotech í øðrum lagi.

**PhD-verkætlanin**
Eftir hesa PhD-undanverkætlan fekst eftir tógvið stríð fígging til eina PhD-verkætlan um collagen og gelatin. Bróðurparturin av fíggingini var útlendskur kapitalur.

Endamálið við hesi ígongdverandi verkætlan er at: Process-optimera extraktión av collagen/gelatin burtur úr skræðu av føroyskum fiskasløgum, so sum toski, upsa og hýsu, svartkjafti, gulllaksi, laksi. Máta týdningarmestu alisfrøðiligu og evnafrøðiligu parametrarnar av framleidda gelatininum og kanna eftir, um hesi parametrar eru støðugir ella broytast við árstíðini. Sammeta mátaðu parametrarnar við útlendsk virði og harvið staðfesta, um føroyskt fiskagelatin hevur serstakar eginleikar ella ikki. Hækka bráðpunktið á marina gelatininum í fyrsta lagi við krossbindingum framdar við enzymum, t.d. transglutaminase og í øðrum lagi við polysaccharidum, eitt nú kappa-carageenan, og harvið gera tað handilsliga kappingarført við onnur terrestrial gelatin-sløg.

Verkætlanin fer fram í Tróndheimi í Noregi. Higartil eru fleiri nýggj og týdningarmikil úrslit nádd. Úrslit, sum kunnu fara at hava stóran týdning fyri føroyska collagen-gelatinframleiðslu.

**Fróðskapur og framburður – mental myrk miðøld - føroyingar serstøk tjóð**
***Fróðskapur og framburður***
Varð meiri peningur settur av til gransking her á landi, so kundu fleiri aðrar fiskivinnurelateraðar verkætlanir verið settar í verk. Verkætlanir sum vissuliga høvdu kunnað skapt ávís nýggj sterk nichu-øki í fiskivinnu og matídnaði okkara. Nichu-øki umfatandi millum annað kendar eins og ókendar innovativar heilsuvarðveitandi, heilsumennandi og sansa-freistandi hávirðisúrdráttir. Vit hava møguleikarnar, men gagnnýta teir ikki (sí “Eru føroyingar fremsta forðan fyri framburði í Føroyum”, www.setur.fo

**Mental myrk miðøld**
Men trupulleikarnir eru mangir og forðingarnar nógvar, serliga millum oyruni á okkum sjálvum. Myrka miðøldin hevur enn rættuliga fast mentalt tak í okkum føroyingum. Fleiri fjølmiðlaframsagnir frá leiðandi og umboðandi persónum eru týðulig tekin um, at upplýsingartíðin hevur torført við at fáa høvdið fyri seg her á landi. Litið verður ikki á vísindi. Fiskimannafelagsformaður in hevur bert niðrandi útsagnir um føroyska gransking. Fyrrverandi løgtingsmaður hevur eyknevnt vísindafólk her á landi køstaflugur, køstaflugur við sevlinum í landskassanum. Ein annar fyrrverandi løgtingsmaður og landsstýrismaður hevur kallað fróðarfólk landsins fyri uppáhang hjá almenna sektorinum. Formaðurin hjá reiðarafelagnum fírnast ikki fyri at eyknevna granskarar landsins fasta kórið á landi. Og mansdomineraða politiska heimastýri okkara heldur eftir øllum at døma, at tað ber væl til at kappast við aðrar framkomnar vísindaliga sterkar tjóðir á globaliseraða marknaðinum, við einum menningarliga stirvnaðum og afturútsigldum vinnulívi, mestsum tómum GM-fíggingargrunnum og fíggjarligum niðurpíndnum analýsutólamanglandi universiteti. Vinnarar verða vit valla.

**Føroyingar serstøk tjóð**
Her er talan um einki minni enn grova vanstýring av landsins gransking, menning og vinnulívi. Hetta skilaloysið og ábyrgdarloysið ger okkum til eina rættuliga sermerkta og serstaka tjóð í framkomna partinum av heiminum. Tí partinum, sum vit fegin vilja javnmetast við. Við hesum administriva dáralætinum, grunnskygninum og andliga myrkrinum í huga kunnu vit av røttum mantra-njóra fyrstu reglu í næstseinasta ørindinum av fosturlandssanginum: “Av øllum londum” hjá Pól F. Joensen: “Vit eru føroyingar serstøk tjóð”.

# Flogferðsla Føroyar/Útheimin

**SÍMUN MITTÚN**
smittun@email.fo

Fyri ikki so langt síðan gjørdi Atlantic Airways vart við, at vegna nógv hækkandi prísir var úrslitið vánaligt fyri 1. kvartal 2008, og botnlinjan vísti reyð tøl.

Fyri at bøta um hetta - varð sagt frá AA - fór felagið at seta prísin á ferðaseðlum upp, og er hetta longu gjørt, men so snildisliga, at vanligur brúkari hevur ringt við at síggja hækkingina.

Uttan kappingarneyta ber hetta væl til, og at hyggja upp á innara kostnað liggur jú ikki til feløg uttan kapping. Dømir er nógv um hetta, til dømis hevði Maersk Air eina príshækkan hvørt ár, tey árini teir vóru í “ostaklokkuni” Danair, sama gjørdi SAS. Tá so liberaliseringin kom innan flogferðslu í Europa, vaknaðu teir við kaldan dreym. Søguna um hesi feløg kenna øll.

Nei góðu tit á AA, hugsið meira kreativt og sum eigari og brúkari fari eg at loyva mær at koma við ymiskum uppskotum.

Sum tað fyrsta haldi eg, at við tí kundagrundarlagi, ið AA hevur, kann tað ikki vera lønandi at flúgva til so nógvar destinatiónir.

Minkið um hesar rutur, til tær, sum geva svørt tøl og ger fleiri fráferðir til eina basislufthavn og gerið avtalur við onnur feløg, um víðari flutning út í heim.

Eg trúgvi, at færri destinatiónir er alneyðugt, serliga tá nýggi flúgvarin til uml. hálva milliard kemur, tá fer í øllum førum ikki at bera til at flúgva til London ella Stokholm við 15-20 ferðafólkum, uttan kollveltandi hækkan av ferðaseðlunum.

Sum nummar tvey, skerjið servering umborð til ein kopp av kaffi/vatn og ein tebolla, sum tann ferðandi tekur við sær, tá hann ferð umborð.

Fyri tað triðja, flytið alla sølu av tollfrium vørum niður á jørðina.

Eg trúgvi, at við nevndu tiltøkum v.m, skuldi borið til, um ikki at lækka prísin, so útseta næstu hækking rættuliga nógv.